## Gjørdi einki ólógligt

Páll Ismarsson Joensen, lærari á Maskinmeistaraskúlanum, gjørdi einki ólógligt, tá hann í november í fjør sendi landsstýrismálanevndini tvey skjøl, sum hann hevði fingið úr mentamálaráðnum. Í desember sendi ein advokatur fútanum skriv um skjølini, tí navnið á varaskúlastjóranum stóð á teimum. Men tað var ikki ólógligt, hevur Páll Ismarsson Joensen nú fingið at vita í brævi frá Finn Ougaard, varafúta. Og fútin ger ikki meiri við málið.

## Koyra ov skjótt

Hámarksferðin í tunlinum til brúnna um Oyrasund er 90 kilometrar um tíman, men kortini eru tað bilførarar, sum trýsta í meira lagi á speedaran, og í onkrum førum er ferðin hjá summum komin upp í 160 kilometrar um tíman. Løgreglan hevur fleiri ferðir gjørt ferðmátingar við endan á tunlinum, men ikki inni í sjálvum tunlinum, tí tað er ov vandamikið. Tí hevur leiðslan í tunnilsfelagnum nú gjørt av at seta sjálvvirkandi ferðmátarar í tunnilin.

# ðis kommunu



*– Eg haldi ikki, at fólk í Eiðis kommununi ganga og hugsa um samanlegging. Men verður tað so, at vit verða trýstir til samanlegging, hevur tað stóran týdning fyri okkum, at bygdaráðið fær møguleikan at samráða seg til tveir sáttmálar, sum fólk síðan kunnu taka støðu til á eini fólkaatkvøðu, sigur Anfinnur Kruse*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

til at geva fólkinum í Eiðis kommunu ein valmøguleika, um alt tos um samanlegging ein dag endar við, at tvungin samanlegging kemur upp á tal. Vit vita jú ikki, hvat bíðar fyri framman, og vit vita heldur ikki, um samanleggingin verður sjálvboðin sum frá líður, sigur Anfinnur Kruse.

### Alfred og Poul

Hann vísir á, at sambært løgtingslógini um sjálvbodna samanlegging halda landsins kosnu menn og kvinnur, at Eiðis kommuna er ein náttúrligur partur av Sunda kommunu.

- Men her í kommununi eru tað nógvir borgarar sum halda, at vit eru ein náttúrligur partur av Eysturoynni, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at tá ið málið eftir triðju viðgerð varð beint aftur í rættarnevndina, vóru umboð fyri bygdarráðið á fundi í rættarnevndini.

- Vit vístu á svarskrivið, vit høvdu sent innlendismálaráðnum og hildu, at rættarnevndin á fundinum skilti okkara sjónarmið um valmøguleikar.

Borgarstjórin í Eiðis kommunu heldur, at tað var sambandsmaðurin og formaðurin í rættarnevndini, Alfred Olsen, sum sveik fólkið í Eiðis kommunu í hesum máli – og umboð Fólkafloksins í rættarnevndini, Poul Michelsen, møtti slett ikki upp, tá ið okkara umboð vóru á fundi við rættarnevndina.

- Tað er nú einaferð so, at fólkafloksmaðurin, Heðin Zachariassen, eisini er borgarstjóri í Sunda kommunu, og tí hildu vit tað vera óheppið, at fólkafloksumboðið ikki møtti – uttan at skula leggja nógv meira í tann samanhangin, sigur Anfinnur Kruse.

### Spennandi tíð

Vit spurdu eisini borgarstjóran í Eiðis kommunu, um hann metir, at tað eru limir í bygdaráðnum, sum telir sjey, ið eru fyri samanlegging í løtuni.

- Nei, eg meti ikki, at nakar av bygdaráðslimunum er fyri at leggja saman við aðrari kommunu í løtuni. Vit ganga eini spennandi tíð á møti í kommununi - við nýggjum og stórum barnagarði, sum verður liðugur um eitt ár, nýggjum fótbóltsvølli, sum verður lagdur í Hólmanum, nógvari sethúsabygging í kommununi, og haraftrat ætla vit okkum at útbyggja atløguviðurskiftini, sigur Anfinnur Kruse.

# Tað grør um gangandi fót

**Í næstum fáa fólk í Eiðis kommunu nýggjan barnagarð, nýggjan fótbóltsvøll, og haraftrat verður atløgusíðan á Eiði útbygd við 80 metrum**

EIÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Lítil ivi man vera í, at tey, sum hava stjórnað Eiðis kommunu í nógv ár, hava gjørt eitt gott arbeiði. Kommunan er væl fyri fíggjarliga, samstundis sum hon er væl útbygd við at kalla øllum teimum fasilitetum, sum ein sjálvstøðug kommuna eigur at hava.

Vinnulívið trívist, og tað ger fólkið í kommununi eisini.

Hvussu tað ber til, at kommunan við einum av lægstu skattaprosentum í Føroyum er so væl fyri fíggjarliga, hóast nógvar og stórar útbyggingar og nýbyggingar, kunnu fólk av røttum spyrja.

Hinvegin er tað eingin loyna, at longu í tíðini hjá Peturi Reinert við virkis-og skiparakstri vórðu lutfalsliga stórar inntøkur skaptar til bygdasamfelagið.

Enn í dag er vælvirkandi vinna á Eiði, og framvegis eigur bygdin nógv og gott sjófólk – og eisini línuskiparar, ið tjena góðan »valuta«, sum eisini sæst aftur í kommunukassanum.

Á Eiði er snotuligt eldrasambýli, sum kommunan læt byggja fyri ein lutfalsliga lágan prís, og fyri fáum árum síðan varð skúlin útbygdur, samstundis sum fólkið í kommununi fekk ítróttarhøll.

Ítrótturin trívist og nørist, og í næstum verður farið undir at byggja nýggjan fótbóltsvøll.

Í vikuni er sáttmáli undirskrivaður um bygging av nýggjum stovni til 67 børn. Í stovninum verður bæði vøggustova, barnagarður og frítíðarskúli, og æltanin er, at stovnurin stendur liðugur um ársskiftið 2007/2008.

Tað er Fjarðahús, sum leverar barnagarðin, ið fer at kosta 7,6 miljónir krónur. Á Eiði halda tey seg fáa rættiliga nógv fyri pengarnar í hesi bygging, tí stovnurin verður latin kommununi lyklaklárur.

Alt er nú klárt til hesa bygging. Økið er gjørt byggibúgvið, og stovnurin verður settur upp av elementum.

Fjarðahús hevur leverað aðrar barnagarðar, eitt nú í Vestmanna og á Strondum.

Á Eiði vænta tey, at eini 11 heiltíðarstørv verða á nýggja stovninum.

Eiðis bygdaráð arbeiðir eisini við at byggja 80 metrar av nýggjari atløgusíðu, og havnanevndin í kommununi hevur fingið til uppgávu at kanna ymiskar prísir og fáa tilboð til vega.

Ætlanin er at byggja 40 metrar av atløgusíðu undir Bátafisk og 40 metrar aftrat úr núverandi bryggjuni.

Tørvur er á meira atløgusíðu á Eiði, tí liggja tvey skip inni í senn, er einki bryggjupláss eftir.

Nógv verður bygt í kommununi, meira enn áður í nýggjari tíð.

Trý raðhús liggja klár at seta upp á økinum omanfyri hotellið, sum AK-Byggivirki byggir og longu hevur selt, og onnur sethús eru eisini í gerð á Eiði.

Trý sethús standa í gerð í Svínáum, og í Ljósáum verða eisini eini sethús bygd í løtuni.

Ak-Byggivirki skal haraftrat byggja seks raðhús í Svínáum í næstum.

Eiðis kommuna er eisini í holt við at útvega sær lendið til aðrar neyðugar útstykkingar í kommununi.